# Rógvi Johansen um venjing, lívsstíl og moral

Rógvi Johansen var í fleiri ár fremsti føroyski súkklarin. Ikki bara her heima, men eisini í Danmark gjørdi hann um seg, og hóast hann ikki longur er aktivur í fremstu røð, so hevur hann framveigis nógva vitan at oysa av. Tí hevur Tórshavnar Súkklufelag boðið honum til Føroya at halda fyrilestur, so eisini onnur kunnu fáa lut í tí, tann nú 44 ára gamli Rógvi hevur at fortelja frá sínum royndum innan súkkling, venjing og ítrótt sum heild. Fyrilesturin verður í ÍSF-húsinum leygardagin, og Rógvi sigur sjálvur, at hann fer at fevna breitt: - Fyrst og fremst fari eg at leggja dent á tað, eg kann fortelja frá mínari sterkastu síðu, sum var einkultstartur, har tú fyrst og fremst skalt kappast við teg sjálvan, og at tað tí snýr seg um rástyrki, góða venjing og mentala javnvág, sigur Rógvi, sum eisini ætlar sær at tosa um moralsku síðuna av ítrótti. Heilt einfalt, tí hann heldur hetta vera eina mangulvøru fleiri staðni. Fyrilesturin í ÍSF-húsinum leygardagin, sum byrjar klokkan 14, er bert fyri limir í Tórshavnar Súkklufelag og Føroya Triathlonfelag.



*Heiðurbáturin var góða bátslongd framman fyri Argjabátin á norðoyastevnu, og tað verður fyrst og fremst við hendan, at guli báturin av Glyvrum skal kappast*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Tað kann gerast heilt spennandi

**Á Norðoyastevnu vóru ábendingar um, at møguleiki kann verða fyri fleiri nýggjum vinnarum, tá ið annar FM róðurin verður í Hósvík í morgin**

KAPPRÓÐUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Longu í morgin verður annar FM kappróðurin í ár. Fyrsti róðurin var í Klaksvík síðsta leygardag, og næstu vikurnar verður kappróður á skránni hvønn leygardag fram til 12. juli. Tá verður Vestanstevna, og so verður steðgur fram til á Ólavsøku.

Í Hósvík eru teir farnir undir fyrireikingarnar til FM róðurin á Sundalagsstevnu, sum verður í morgin. Har verður róð á øllum trimum teinunum – 1000, 1500 og 2000 metrum – og hann sigur frá hampuligum høgættarveðri. Hitin verður kanska upp í 10 stig, og vindurin verður 5-10 metrar um sekundið. Tað verður skýggjað loft og okkurt ælið verður eisini.

Eingin ivi er í, at tað hevur týdning fyri kappingina, at bestu bátarnir frá Norðoyastevnu og harvið favorittarnir hesa ferð nú hava hvønn annan undir liðini. Intensiteturin verður størri, enn tað er møguleiki fyri, at hann kann verða, tá ið tað kann vera heilt langt ímillum teir, sum eru í harðari kapping, og so kann tað ikki útilokast, at umstøðurnar at rógva kunnu vera rættiliga ymiskar, tá ið tað eru langur teinur ímillum bátarnar.

## Tættar kappingar

Á Norðoyastevnu vann Drekin róðurin millum gentubátarnar. Hvassi, sum í fjør stóð seg so ógvuliga væl, var næstur gentunum í Havnar Róðrarfelag. Nú er báturin av Oyri so tætt við at vera í heimasjógvi, sum tað ber til, og gentunar av Eysturoyarlandinum í Sundalagnum fara ivaleyst at leggja alt og kanska meiri enn tað fyri í royndini at endurvinna sigurin, sum tær vunnu á Sundalagsstevnu í fjør.

Kvinnurnar umborð á Sílinum vóru á Norðoyastevnu eina bátslongd frammanfyri Frúnna, sum hesa ferð tykist vera einasti avbjóðari. Í kappingini millum 6-mannafør við kvinnum verður tað kappast hesa ferð. Tað var ikki fyrrenn fríggjadagin í síðstu viku, at tað varð greitt, at Jarnbardur og Gongurólvur fóru at kappast á Norðoyastevnu.

Dreingirnir umborð á Sílinum vunnu mest sannførandi sigurin av øllum á Norðoyastevnu. Havfrúgvin og Junkarin vóru í tættari kapping um næstfremsta plássið. Tað er torført at ímynda sær, at hesir báðir bátarnir, sum í morgin fara at rógva hvørju sínu megin Sílið, kunnu megna at veita havnardreingjunum kapping um fremsta plássið. Men nú fæst at síggja.

Sundabáturin var í Klaksvík eina bátslongd undan Tvørabátinum, og Heiðabáturin var eina stóra bátslongd frammanfyri Argjabátin. Sambært úrslitini á Norðoyastevnu er lítið sannlíkt, at Sundabáturin og Heiðabáturin fara at fáa kapping frá øðrum enn hesum báðum.

Tað kennist sum sannur aldudalur, at tað bara luttaka tvey 10-mannafør. So lítil hevur luttøkan ongantíð verið áður, síðani tað í 1973 varð farið at kappast um FM eftir galdandi skipan, og tað skal leitast væl og leingi langt aftur í tíðina fyri at finna so lítla luttøku í kappingini, sum plagar at vekja størst áhuga millum áskoðararnar. Tíbetur vísti tað seg á Norðoyastevnu, at talan er um tætta kapping, og hóast Ormurin eftir finan start stýrdi kappingini og vann trivaligan sigur á Havnarbátinum, so bendir alt á, at tað eisini í Hósvík fer at verða tøtt kapping, hóast tað longu frammanundan er greitt – og tað er spell – at vinnarin verður í Suðurstreymi. Klaksvíkingur, Eysturoyingur, ein bátur úr Suðuroy og Vestmenningur høvdu av sonnum prýtt um kappingina.

# Todi er nú stjóri í FC Amager

**Strategurin handan hondbóltsævintýrið í Slagelse er nýggjur nevndarformaður, og Todi Jónsson er nú stjóri í Fremad Amager**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Síðani Nicolai Kaas-Heilmann gavst sum stjóri um ársskiftið, hevur Todi Jónsson verið virkandi stjóri í felagnum, men nú verður hetta gjørt til varandi loysn, sigur Fremad Amager í tíðindaskrivi.

- Við hesum fær Todi møguleika at nýta meira orku í dagliga rakstrinum av felagnum, soleiðis at málini, sum felagið hevur sett, kunnu røkkast, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Nýggjur nevndarformaður, nú Todi verður stjóri burturav, er Brian Mollerup. Hann hevur áður havt fleiri topp-sessir í donskum vinnulívi, og ikki minst er hann kendur sum maðurin, ið saman við Anju Andersen stóð handan stóra hondbóltsævintýrið í Slagelse.

# B36 kann arga KÍ

**Eisini hjá kvinnum verður steypafinalan leygardagin. KÍ hevur verið plágað av skaðum, men vónin er sjálvandi at endurvinna steypaheitið**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Verður tosað um kvinnufótbólt í Føroyum, so slepst illa undan at nevna KÍ.

Kvinnurnar úr Klaksvík hava verið í flokki fyri seg seinastu nógvu árini, og tær upplagdir favorittar undan finaluni leygardagin.

Skal nakað lið arga KÍ, so er tað tó helst B36, sum í fjør var so sera nær við at taka FM-heitið til Havnar fyri fyrstu ferð í níggju ár. Landskappingardystinum herfyri gav eisini ábendingar um, at B36 kann hótta KÍ, tí har vóru tær úr Havn bert eitt misnýtt brotsspark frá at eiga øll stigini móti einum KÍ-liði, sum tó eisini var rakt av skaðum.

Og her er tað ikki minst saknurin í Malenu Jospehsen, sum hevur verið meinur. Umframt sjáldsama góða máltevið, so er Malena eisini ein av teimum, sum støðugt koyrir undir viðspælararnar, og tí vóna tey í Klaksvík, at hon verður tøk til dystin leygardagin.

Talan er annars um 10. steypafinaluna á rað hjá KÍ-kvinnunum, og tað finst neyvan ein betri háttur at markera hetta, enn at kvinnurnar enn eina ferð koma norður við steypinum í hond.